# a oyggjaland

*Lagt til rættis:*
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Myndir:*
*Álvur Haraldsen*
*alvur@sosialurin.fo*



Men liva vit upp til hetta? Og hvønn mátistokk hava tey fólkini brúkt, ið hava útnevnt oyggjar okkara til henda fornemma heiður? Um tey yvirhøvur hava verið her og hugt upp á umstøðurnar, so er ivaleyst gjørt skjótt av. Og hava hesi verið varug við tey túsundtals tonsini av burturkasti, sum sløðist runt allastaðni? Um so er, kann hetta valla hava talt við í grundarlagnum fyri metingini. Annars má standa ómetaliga illa til í øðrum oyggjalondum, sum eru á listanum hjá blaðnum. Tað var í øllum førum ikki torført at fáa eyga á óruddið ígjøgnum myndatól okkara.

Føroyar eru naknar og opnar, og tí sæst óruddið her nógvar ferðir betri, enn tað ger í londum, har trø og annar vøkstur kann fjala ein stóran part. Nøkur vøkur sjón er hetta ikki, og fyri mong man tað tykjast óskiljandi, at fyritøkur, stovnar, kommunalir myndugleikar og onnur sleppa avstað við at seta gamlar maskinur, bilskrokkar, bingjur og annað burturkast frá sær á slíkan hátt. Ringast er við havnaløg, alistøðir, ídnaðarøki, bóndagarðar, jarðarbrúk og í niðurløgdum grótbrotum, har onki mark tykist vera fyri skilaloysinum. Og hvør hevur ábyrgdina fyri, at hetta kann lata seg gera? Tosað verður nógv um nýggjar brennistøðir, tí orkan er ov lítil, men hesar megna onki at gera við gamalt jarn. Tað má tyrvast ella flytast av landinum.

*Herferðin hjá Sosialinum tykist longu hava givið úrslit. Síðani blaðið fór í gongd við at vísa á órudd og burturkast, hevur Tórshavnar kommuna álagt øllum at rudda upp á kommunalum vegum og økjum. Hetta skuldi gerast í seinasta lagi 7. juli. Annars varð alt burturbeint uttan aðra ávaring. Samstundis hevur kommunan tikið fyrivarni fyri at krevja allar útreiðslur í hesum sambandi endurgoldnar fyri eigarans rokning.*

Eisini í dag lata vit myndirnar tala, og tað halda vit fram við. Í feriutíðini nú í juli mánaða verður hetta eina ferð um vikuna, men í august fara vit aftur at gera hetta fleiri ferðir um vikuna.


Eiði


Eiði


Eiði


Eiði


Ljósá


Eiði


Ljósá




Ljósá


Ljósá


Ljósá